# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Neistin vann tepurt



**Teir bláu úr Havn var á vitjan í Kollafirði í gjárkvøldið, og haðani fóru teir við øllum. Teir vóru frammanfyri, meginpartin av dystinum, men eitt skifti vóru KÍF á odda. Støðan helt tó bara eina løtu, og móti endanum dróg Neistin longra stráðið**

HONDBÓLUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Neistin var frammanfyri, nærum allan dystin í Kollafirði í gjárkvøldið, men eitt skifti megnaðu KÍF at halda Neistanum frá fatinum í átta minuttir. Hetta var við til at venda dystinum, og komu KÍF eisini framum, hesa løtuna við tveimum málum. Støðan var tá 25-20 til heimaliðið, men so var tað sum um alt datt á gólvið.

### Avgerandi løtan

Tá KÍF vóru frammanfyri við tveimum málum, fingu teir brotskast í sín lut. Hetta tók Teitur Joensen sær av, men tá hann hevði skorað, varð málið ikki viðurkent, og umkast varð dømt. Orsøkin skuldi vera at tann eini dómarin ikki var komin á rætt pláss, áðrenn skotið var. Umkastið gav ikki somu úrtøku, og viðførdi tað samstundis eitt sindur av órógv í KÍF leguni. Neistin megnaðu at gera sær dælt av hesum, og við einum sera vælleikandi Inga Olsen á liðnum, megnaðu teir at leggja seg framum aftur.

Teir í Kollafirði megnaðu at fáa eitt seinasta mál, men lítið batti, tí nærri komu teir ikki, sjálvt um teir høvdu bóltin við 25 sekundum eftir á klokkuni, eftir at Neistin hevði framt álopsfeil.

## FAKTA

**KÍF – Neistin 26-27 (13-14)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Damir Oros 6, Teitur Joensen 5 (4), Eddie Joensen 4, Dejan Jankovic 4, Røgvi Weihe, Niklas Reginsson 3
**Neistin:** Dan Torleivson 7, Ingi Olsen 5 (1), Jugoslav Djumic 5, Karl Herup Olsen 3, Tróndur Kragesteen 3, Blagoje Buha 3 (1), Róar Dalsgarð 1
**Brotskøst:** KÍF 5, Nesitin 6
**Útvísingar:** KÍF 3, Neistin 4
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

# VÍF høvdu munin



**StÍF løgdu væl út, men gjørdu ov nógvir tekniskir feilir, og tá so VÍF byrjaðu at mansverja tvær av StÍF spælarunum, tá var trupult hjá teimum av Strondum at koma inn í dystin aftur. –Vit gera ov nógvir tekniskir feilir í dag, og vit kunnu bara læra av okara mistøkum og koyra á til næsta dyst, sigur ein avgjørd Ninna K. Johansen**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

StÍF løgdu væl fyri í byrjanini á dystinum, men teknisku feilirnar bara øktust, so tað gjørdist trupult. Strandingar megnaðu tó at halda munin, tær bjargaðu sær, fyrst í fyrra hálvleiki, og tá brikslað var til hálvleiks, tá stóð 13-12 til StÍF.

Í øðrum hálvleiki megnaðu tær úr Vestmanna at hála alt meira inn á strandingar, og tá annar hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, fingu VÍF javnað til 18-18, og síðani lagt seg á odda 23-19.

VÍF byrjaðu at mansverja tvær av StÍF spælarunum, og tá varð sera trupult at spæla, tí plássið gjørdist minni, og vit fingu onki at hanga saman, sigur Ninna. Hon heldur fram við at siga at VÍF var betur í dag, og gjørdu ikki eins nógvir tekniskir feilir, og vit. Hetta var nokk munurin á liðunum í dag.

Tá alt kom til stykkis, og dysturin var av, vóru tær úr Vestmanna frammanfyri við tveimum.

## FAKTA

**StÍF – VÍF 22-24 (13-12)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7, Ninna K. Johansen 4, Ata Gregerssen 4, R. Johansen 2, O. Danielsen 2, Jóhanna í Króki 1, Fríðun Danielsen 1, Bára Danielsen
**VÍF:** Torgunn H. Johansen 6, Iona Rapa 5, Fríða Marjunardóttir 4, Marita Johannesen 3, Katrin Christophersen 1, Liljan Djurhuus 1, Rannvá á Røgvi 1, Heidi Joensen 1
**Brotskøst:** StÍF 5, VÍF 2
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 2
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kári Hansen

# StÍF vísir styrki

**StÍF byrjaðu sum eitt ódnarveður, tá teir fingu vitjan av vestmenningum í gjárkvøldið. Tað hoyrist av Strondum, at tað ongantíð var nakar ivi í, hvør sigursharrin fór at vera**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Vestmenningar vóru á vitjan á Skála í gjárkvøldið. Har møttu teir einum reyðhvítum ódnarveðri, í fyrra hálvleikí. Tað var ongantíð nakar ivi í, hvør vinnarin av dystinum fór at verða.

Spælið var skjótt og strandingar tóktust seta dagsskránna, hesum viðvíkjandi. Tað riggaði nærum alt, ið StÍF tók sær til, og samstundis gekk minni væl hjá VÍF.

VÍF hevur havt stóra útskiftan á liðnum, og fleiri av profilunum frá mongu seinastu árunum, eru ikki at síggja á liðnum í ár. Hetta hevur sett síni spor, men av Strondum siga teir seg ikki vera í iva um at vestmenningar fara at koma sterkt aftur. – Teir skulu bara finna stevið, so koma teir aftur í gongd og upp, har teir hoyra heima, upp í toppin.

Millum spælararnar, ið vístu stórspæl, vóru Sveinur Justinussen, Danni Syhler og David Edvardsen, ið skutu ávíkavist 11, 7 og 6 mál hvør. Besti málskjútti hjá vestmenningum í gjár, var Regin Joensen, við 6 málum.

## FAKTA

**StÍF – VÍF 34-27 (21-13)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 11 (1), Danni Syhler 7, David Edvardsen 6 (1), Bárður Danielsen 3, Borgar Danielsen 2, Jón Rasmussen 2, André Danielsen 2, Bent Djurhuus 1
**VÍF:** Regin Joensen 6, Áki Olsen 4, Sámal Joensen 4, Agnar Joensen 4, John M. Andreassen 4, Rúni Joensen 2, Niels Andreasen 2, Dávur Magnussen 1.
**Brotskøst:** StÍF 3, VÍF 3
**Útvísingar:** StÍF 5, VÍF 4
**Dómarar:** Kári Hansen & Karstin Joensen